

Olympic Canyon. Mynd: Olympic

# Frálandaskip fann flogfar á 1000 metrar dýpi

**Jógvan Hugo Gardar**

10.08.2015 - 08:33

Oljan.fo

Norska reiðaríið Olympic, har nógvir føroyingar sigla við, er blivið fagna í India. Orsøkin er at Olympic Canyon hevur funnið og bjarga vrakinum av einum vaktarflogfarið sum lá á næstan 1000 metra dýpi.

Umleið ein milliard fólk í India hava sæð sjónvarpsinnslagið, ið er víst á næstan 70 rásum. FiskeribladetFiskaren skrivar um tað heilt serligu bjargingina, har flestu av stóru vraklutunum, tól og tey sum doyðu eru funnin og tikin upp á land.

Sjónvarpsrasin NDTV sigur at talan er um størstu bjarging á sjónum av hesum slagnum í Indiska havinum nakrantíð. Sagt verður eisini at einasta skipið sum kundi gjøgnumføra bjarginina var Olympic Canyon.

Skipið er bygt á Brattvåg-skipasmiðjuni í Noregi í 2007.

Olympic Canyon fann flogfarið um hálvan juli. Tá vóru 33 dagar farnir síðani flogfarið datt niður. Olympic Canyon er serútgjørdur við útgerð sum skal kunna arbeiða á djúpum vatni, og ikki minst skal kunna taka lutir upp av djúpum vatni.

*Innslagið á NDTV sæst niðanfyri.*



Innslagið á NDTV